umhvørvisstovan

Vegleiðing 3/2017

# Vegleiðing um brenning av báli og eldstaði

**Henda vegleiðing fyri bál eins og fyri eldstøð bæði uttan- og innandura er ætlað kommunum, feløgum og einstaklingum. Vegleiðingin er bert galdandi fyri virksemi, ið kommur hava eftirlit við.**

## Dømir um bál og uttandura eldstøð, ið henda vegleiðing er galdandi fyri

- steinsett bálpláss, bálføt, tunnur, peisir og jóansøku- og nýggjársbál o.l.

## Dømir um innandura eldstøð, ið henda vegleiðing er galdandi fyri

- peisir, grúgvur, ovnar, ketlar o.l.

## Ikki er loyvt at brenna burturkast[i]

Endamálið við einum báli ella eldstaði má ongantíð verða at sleppa sær av við burturkast. Burturkast skal ikki brennast, tí nógvur og eisini vandamikil roykur kann koma frá hesum. Alt burturkast skal latast góðkendum móttakara so sum IRF ella KB (Tórshavnar kommunu).

## Loyvi krevst til størri bál

Loyvi krevst frá kommununi, tá talan er um stór uttandura bál, so sum nýggjárs- og jóansøkubál. Hetta er ikki galdandi fyri smærri bál og/ella eldstøð, tá endamálið t.d. er matgerð ella annar útihugni.

Er skrivligt loyvi givið frá kommununi og møguliga eisini sløkkiliðinum, eigur ábyrgdarpersónurin at hava loyvið hjá sær, soleiðis at tað, um biðið verður um tað, kann vísast avvarðandi myndugleika.

## Lítil bál

- í mesta lagi 120 cm í tvørmát
- skulu vera í minsta lagi 10 m frá næsta húsi
- veðrið skal altíð vera til vildar, og verður frámælt at kynda bál um vindurin er yvir 10 m/s

Umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

## Stór bál

- størri enn 120 cm í tvørmát
- skulu vera í minsta lagi 30 m frá næsta húsi
- veðrið skal altíð vera til vildar, og verður frámælt at kynda bál um vindurin er yvir 15 m/s
- er bálið størri enn 3 m í tvørmát og 2 m høgt, eigur tað eisini góðkennast av sløkkiliðinum
- treytir, sum eru ásettar í loyvi frá kommununi, skulu lúkast

## Loyvt er at brenna

- pappír og papp
- óviðgjørdan og turran við so sum træplattar, trækassar og greinar
- torv, kol og koks o.l.

## Ikki er loyvt at brenna

- litað lýsingabløð og annað blankt pappír
- bildekk, gummi og plast
- viðgjørdan við – dømi: trýstviðgjørdur, málaður og lakkeraður viður
- spønplátur og træ við plastlaminati
- innbúgv – dømi: sofur, madrassur
- spillolju og annað vandamikið burturkast

## Má ikki vera til ampa

Bál, stór sum smá, og eldstøð, bæði innan- og uttandura, mugu ikki elva til ampa. Um brenningin elvir til ampa, skal kommunan[ii] ella politiið[iii] geva boð um, at eldurin skal sløkkjast.

## Upprudding

Leivdir frá báli skulu altíð takast upp, skjótast til ber. Fyriskipari av báli hevur ábyrgdina av, at ruddað verður skjótast gjørligt aftan á, at bálið er sløknað. Leivdir frá báli skulu latast til kommunalu burturkastskipanina.

Fyrsta útgáva: juli 2005
Seinast dagførd: 20. juni 2017

[i] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast
[ii] § 12, stk. 4 í kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, við seinni broytingum
[iii] § 14 í politiviðtøkuni fyri Tórshavnar kommunu, og §4 í politiviðtøkuni fyri landkommunurnar